# Almannastovan

## Fosturfamilja til pinkubarn

Søkt verður við hesum eftir fosturfamilju til 2 mdr. gamla gentu. Roknast má við at barnið hevur tørv á at verða til fosturs yvir eitt longri tíðarskeið.

Neyðugt verður at annað av fosturforeldrunum verður heima hjá barninum til tað er uml. 1 ára gamalt. Ein partur av uppgávuni hjá fosturfamiljuni er at viðvirka, tá ið foreldrini skulu hava samveru við barnið.

Samsýning verður veitt til fosturforeldur eftir galdandi reglum.

Av tí at málið hevur skund, er freistin at søkja tann 23. apríl 2004.

Áhuga kunna fáa nærri upplýsingar við at venda sær til

**Almannastovuna**
Barnaforsorgardeildin
**att.: Beinta Festirstein, tlf. 353510**



Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn

## Sjúkrarøktar-frøðingur

Á **B5** er hesi størv sum sjúkrarøktarfrøðingur leys at søkja:

- fast starv á starvsbrøki 0,7 í kvøldvakt til setan skjótast gjørligt
- tvey heiltíðar avloysarastørv í skiftandi vaktum til setan skjótast gjørligt til og við 31. mai 2005

Deildin er ein kirurgisk deild við servitan innan ortopædi, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum, gynækologiskum, eyga, oyra, nøs og hálsasjúkum. Á deildini er pláss fyri 25 sjúklingum.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Elin Vitalis, deildarleiðara á B5 á telefon 304500, lokal 5005 ella til Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, e-postur ceci@lsh.fo

**Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingi:**
- sum hevur prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- sum hevur fakliga vitan og royndir innan kirurgiskari sjúkrarøkt
- við fleksibiliteti og góðum samstarvsevnum
- sum er opin og positiv
- sum vil søkja mennandi avbjóðingar

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 3. mai 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn í brævbjálva merktur »umsókn til starv« við CV, autorisatión, avrit av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«



## Bayliner Sunbridge 2255 við Alfa One drevi



Hevur 190 hestar V6 bensin motor. Báturin er árgang 91. Gongur um 37 míl.

Viðfestisvognur fylgir við.

Ringið og fái meira at vita á

**tlf. 770086**


Sosialurin


## Hølir í Tórshavn til leigu

Skrivstovuhøli til leigu.
Hølini er uml. 100 m² og er møguleiki fyri at víðka til 200 m². Hølini hava egna inngongd og møguleika til allar hentleikar sum t.d. toilet, køk. vm.

Eisini er goymsluhøli 200 m² til leigu. Høli hevur 2 portur sum eru 4,0 x 4,5 metur til støddar hvørt. Toilet og aðrir hentleikar eru í goymsluhølinum.

**Sosialurin**
**Box 76 · FO-110 Tórshavn**
**Bill.mrk. 609**



## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 16. apríl 2004, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Betongblandistøð hjá Articon á Drelnesi**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo. www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**








# GSM telefonir

Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic

# Tráðleysar

Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast

# Til skip og bátar

NMT 450 - VHF telefonir v.m.

**Storno**
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045








SOSIALURIN
HEVUR FINGIÐ
NÝGGJ NUMMUR
tel 34 18 00
fax 34 18 01
GOMLU NUMRINI
RIGGA IKKI
LONGUR
Sosialurin



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Dagstovnin í Øksnagerði eftir:**
- einum pedagogi til nýstovnaða vøggustovu at starvast 30-35 tímar um vikuna. Starvið verður sett 1. juni 2004.
- einum pedagogi í barnagarðsstovu at starvast 30-40 tímar um vikuna. Starvið verður sett 15. august 2004.
- einum hjálparfólki fyri pedagog í farloyvi at starvast 40 tímar um vikuna. Starvið verður sett 1. juni 2004.

Leiðari: Jesper Roos, tlf. 319959
Øksnagerði 1
FO 100 Tórshavn

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. mai 2004.

**Barnaansingin**
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Dagstovnurin í Øksnagerði**
Í dagstovninum ganga 52 børn. Stovnurin er skipaður við eini vøggustovu við 12 børnum, tveimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari serstovu við 8 børnum. Á stovninum starvast 19 starvsfólk.

www.torshavn.fo



NoMA
NORDIC MULTIMEDIA ACADEMY

# Multimediedesigner

**Hard Fun Real Life**

**En to-årig videregående uddannelse**

- Kreativt design
- Kommunikation
- Multimedieudvikling
- Projektledelse og e-business.

NoMA er det nye akademi for multimedier på CEU Kolding. Her får du både et solidt fagligt fundament og erfaring i at løse opgaver fra det virkelige liv.

Vi samarbejder med danske og internationale virksomheder om projektopgaver og praktikophold.

Studieturen går til San Francisco.

Vi arbejder i et internationalt miljø i nye inspirerende rammer. Du kan tage uddannelsen på dansk eller engelsk.

Vi er en skole med studerende fra mange lande, så du bliver ikke den eneste der flytter langt for at tage en uddannelse.

Læs mere på: www.noma.nu, tal med Anni Grøndal på 79 320 200, eller skriv til: anni@noma.nu

Tilmeld dig på kontakt@noma.nu

Vi har det sjovt og kræver noget af dig. Derfor kalder vi det Hard Fun Real Life. Det giver din karriere et stærkt afsæt.

www.noma.nu

en del af CEU Kolding, Skovvangen 28, DK 6000 Kolding
tlf.: +45 79 320 200 - kontakt@noma.nu - www.noma.nu



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## KT-Starvsfólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir hjálpara til KT-netumsitaran.

**Nakrar av høvuðsuppgávunum**
- at umsita netið, servarar, krossfelt og hartil hoyrandi útgerð
- at umsita brúkarar
- at finna feilir, umvæla og seta teldur upp
- at skráseta net-útgerð
- veita tænastu(support) til starvsfólk og til heimaarbeiðspláss

**Førleikakrøv.**
Vit leggja dent á, at tú
- ert teldustøðingur
- hevur royndir innan net og servarar
- dugir at samstarva við ymsar fakbólkar
- dugir at leggja til rættis og raðfesta

**Persónligir eginleikar**
Vit leggja dent, at tú:
- ert røkin
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- ert til reiðar at taka eina hond í, tá á stendur

**Kommunan bjóðar.**
- eitt áhugavert starv við nógvum avbjóðingum
- møguleika fyri fakligari og persónligari menning
- ein viðhvørt strævnan dag
- eitt hugnaligt og inspirerandi umhvørvi
- flextíð

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Inga Ellingsgaard,(ingi@torshavn.fo) KT-leiðara, ella til Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5. mai 2004. Setanarsamrøður verða 12. mai 2004.

**KT-deildin**

heldur til á Glade Hjørn og har starvast 7 fólk.

Deildin umsitur alla kunningartøkni hjá kommununi. Eisini gera vit egnar skipanir.

Vit hava eitt LAN við 18-20 servarum og eitt WAN, har fleiri enn 100 sambond eru og gott 300 teldur tilsettar.

Av stórum spennandi verkætlanum kunnu nevnast:
- nýggj telefonskipan til allar kommunalar stovnar og miðfyrisitingina við sentralum vekslara og við bæði digitalum- og ip-telefonum
- eitt undirvísingarnet til kommunalu skúlarnar við sentralum servarum.

www.torshavn.fo






Hvat hava vit fingið burtur úr arbeiðinum hjá kvinnunum í 60unum og 70unum?

*Hvar vóru vit tá? Hvar eru vit nú?*

## Kvinnudagur á Hotel Hafnia

24. apríl kl.8.30 til 13.00

Evnini eru:
Politikkur - Fjølmiðlar - Gransking - Vinnulív - Leiðsla - Javnstøða

Tekna teg á Hotel Hafnia tel. 31 32 33 innan 22. apríl.
Kostnaður 250,- fyri hvønn, fyri ráðstevnuna & morgunbuffé

**URD**